## Almannamálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. mars 2020 |
| Mál nr.: | 19/00974 |
| Málsviðgjørt: | PL |
| Eftirkannað: | 5. februar 2020 |

**Løgtingsmál nr. 80/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum** (Heimildargrundarlagið broytt frá forsorgarlóg til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur)

### Uppskot til

### Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum

(Heimildargrundarlagið broytt frá forsorgarlóg til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 28. apríl 2000, løgtingslóg nr. 150 frá 20. desember 2005 og løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, verður § 1, stk. 1 orðað soleiðis:

"Heimildin hjá landsstýrismanninum sum kærumyndugleiki verður lagdur til kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum, sum skal viðgera og taka endaliga fyrisitingarliga avgerð í kærumálum sambært hesum løgtingslógum:

1) Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, sbrt. § 71.
2) Løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening, sbrt. § 6, stk. 4.
3) Løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, sbrt. § 16.
4) Løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt, sbrt. § 10, stk. 3."

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.
*Stk. 2.* Avgerðir, ið eru tiknar sambært lov om offentlig forsorg, og har freistin fyri at kæra ikki er farin, kunnu framvegis kærast til kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið er ein fylgibroyting sum avleiðing av, at lógaruppskotið um almannatrygd og tænastur kemur í staðin fyri galdandi forsorgarlóg (lovbekendtgørelse om offentlig forsorg), og neyðugt er tí at rætta tilvísingina til heimildargrundarlagið í § 1, stk. 1, nr. 1 í lóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum samsvarandi. Samstundis verður § 1, stk. 1 broytt soleiðis, at hendan samsvarar galdandi reglum um uppsetan av lógarteksti.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum verður § 33, stk. 6 í lov om offentlig forsorg nevnd sum heimildargrundarlag hjá kærunevndini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er at rætta tilvísingina til heimildargrundarlagið í § 1, stk. 1, nr. 1, so at hetta samsvarar við røttu ásetingina í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Tilvísingin til § 33, stk. 6 í lov om offentlig forsorg verður broytt til í staðin at vísa til § 71 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, soleiðis at heimildargrundarlagið samsvarar við nýggju løgtingslógina um almannatrygd og tænastur, samstundis sum at § 1, stk. 1 verður orðað av nýggjum, soleiðis at hendan samsvarar við galdandi reglur um uppsetan av lógarteksti.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Í sambandi við at lógaruppskotið varð lagt fram í Løgtinginum á vári 2019 (løgtingsmál nr. 136/2018) lá uppskotið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri, samstundis sum tað varð sent fleiri myndugleikum, felagsskapum o.ø. til ummælis. Ongi hoyringarsvar komu til lógaruppskotið.

Uppskotið verður nú lagt fram av nýggjum. Uppskotið er júst sama uppskot, sum varð lagt fram á vári í 2019. Uppskotið hevur tí ikki verið til ummælis.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar við sær.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóða sáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan og Sáttmála sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Tilvísingin til § 33, stk. 6 í lov om offentlig forsorg sum heimildargrundarlag hjá kærunevndini verður broytt til røttu ásetingina í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, samstundis sum § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis, at hendan samsvarar við galdandi reglur um uppseting av lógarteksti.

**Til § 2**
Gildiskoman er ásett til 1. januar 2021, tí lógaruppskotið hoyrir saman við uppskoti til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin) og uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, ið somuleiðis hava gildiskomu 1. januar 2021. Serliga í mun til uppskotið um tvingsilslóg er tað av týdningi, at tørvur er á einum ávísum tíðarkarmi at skúla og vegleiða starvsfólk at seta tvingsilsnevndina og fáa mannagongdir fyri virksemi hjá nevndini og vegleiðingar annars orðaðar.

Í stk. 2 er ásett skriftisregla, soleiðis at tær avgerðir, ið eru tiknar sambært lov om offentlig forsorg, og har freistin at kæra ikki er farin, framvegis kunnu kærast til kærunevndina. Hetta fyri at kærunevndin framvegis hevur heimild at viðgera hesar avgerðir, hóast lógarbroytingin er komin í gildi.

Almannamálaráðið, 3. mars 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur